# Reglugerð um lestrarvirkni á Fróðskaparsetri Føroya

ásett við heimild í § 12 í kunngerð nr. 97 frá 17. juni 2021 um útbúgvingar á Fróðskaparsetri Føroya
við seinni broytingum

Henda reglugerð fær gildi 1. august 2024 og er galdandi fyri lesandi, sum verða innskrivað til lestur lestrarárið 2024/2025 ella seinni.

Lesandi, sum longu eru undir lestri, tá henda reglugerð fær gildi, skulu framhaldandi lúka krøvini um lestrarvirkni ásett í einstøku námsskipanunum ella aðrastaðni.

## 1. Um lestrarvirkni

Virkin luttøka í undirvísingini er neyðug fyri at tryggja góðskuna í undirvísingini og læring hjá hvørjum einstøkum lesandi.

Tann, ið er innskrivaður til lestur á Fróðskaparsetri Føroya (Setrinum), eigur at vera lestrarvirkin og fullføra útbúgvingina til ásetta tíð (íroknað heimilað frávik frá útbúgvingartíðarskeiðinum vegna t.d. barnsburð).

Setrið ásetur krøvini til lestrarvirkni, og Lestrarskrivstovan á Setrinum umsitur og tekur avgerð í málum um lestrarvirkni.

Lestrarvirkni verður eftirkannað regluliga, og tað fær avleiðingar fyri tann lesandi, um lestrarvirkni ikki er nøktandi.

Niðanfyri verða krøvini til lestrarvirkni og undantøkini nærri lýst og útgreinað.

## 2. Krøv til lestrarvirkni

At vera lestrarvirkin merkir, at tann lesandi lýkur ávís krøv um uppmøting og virkna luttøku, og harumframt avrikar ávíst minstamark av ECTS hvørt lestrarár. Í hesum sambandi verða neyðug atlit tikin til útbúgvingar, sum byrja 2. hvørt ár.

Tá talan er um fulltíðarútbúgvingar á Setrinum, verða ikki góðtiknar afturvendandi grundgevingar frá lesandi fyri manglandi lestrarvirkni sambært pkt. 3.2, 3.3. og 3.4 niðanfyri, at viðkomandi vegna hjástørv, frítíðartriv ella líknandi ikki megnar at lúka ásettu krøvini um lestrarvirkni.

### 2.1. Uppmøting og virkin luttøka fyrstu lestrarhálvu á øllum bachelorútbúgvingum

Væntað verður, at tann lesandi tekur ábyrgd fyri egnari læring og møtir til undirvísing, er fyrireikaður, letur inn uppgávur o.a. og luttekur aktivt í kjaki og framløgum.

Avvarðandi undirvísari heldur eyga við og noterar uppmøtingina og virknu luttøkuna hjá hvørjum einstøkum lesandi.

Avleiðingarnar av vantandi uppmøting og vantandi virknari luttøku fyrstu lestrarhálvuna á bachelorútbúgvingum eru ásettar í pkt. 3.2 niðanfyri.

### 2.2. Minstukrøv til ECTS restina av útbúgvingartíðarskeiðinum

Lesandi skulu avrika ávíst tal av ECTS hvørt ár fyri at verða roknað sum lestrarvirkin. Minstamarkið ásetur, hvussu nógv ECTS tann lesandi í minsta lagi skal standa á hvørjum ári fyri at kunna fullføra útbúgvingina innan mest loyvdu lestrartíð, sum er vanlig lestrartíð + 1 ár.

Árligu ECTS minstukrøvini fyri einstøku útbúgvingarnar eru hesi:

| | 3-ára bachelor | 3½-ára bachelor | 4-ára bachelor | 2-ára master |
|---|---|---|---|---|
| 1. lestrarár | 45 ECTS | 47 ECTS | 48 ECTS | 40 ECTS |
| 2. lestrarár | 90 ECTS | 94 ECTS | 96 ECTS | 80 ECTS |
| 3. lestrarár | 135 ECTS | 141 ECTS | 144 ECTS | 120 ECTS |
| 4. lestrarár | 180 ECTS | 188 ECTS | 192 ECTS | |
| 5. lestrarár | | 210 ECTS* | 240 ECTS | |

*Skal vera staðið í seinasta lagi 4½ ár eftir lestrarbyrjan, t.e. við endan á 9. lestrarhálvu.

Árligu ECTS-minstukrøvini verða gjørd upp, tá allar próvtøkur, umframt sjúkra- og endurpróvtøkur í avvarðandi lestrarári eru avgreiddar.

Mest loyvda lestrartíðin fyri aðrar útbúgvingar, so sum hjánám, ískoytis- og eftirútbúgvingar, diplomútbúgvingar og støðisútbúgvingar, er ásett í námsskipanini fyri avvarðandi útbúgving.

Tíðarskeið, tá lesandi eru í grundaðum farloyvi, telja ikki sum lestrartíð. Grundað farloyvi er nærri lýst í reglugerðini um farloyvi til lesandi.

### 2.3. Tillagaðar treytir um lestrarvirkni til lesandi við skerdum virkisførleika

Lesandi við skerdum virkisførleika kunnu fáa tillagaðar treytir um lestrarvirkni, sum taka neyðug atlit til tørvin hjá tí einstaka.

Tann lesandi skal senda Lestrarskrivstovuni umsókn um tillagaðar lestrartreytir, og saman við umsóknini skal leggjast skjalprógv fyri skerda virkisførleikanum hjá viðkomandi t.d. váttan frá serfrøðingi, umframt eitt uppskot til ætlaða lestrargongd.

Lestrarskrivstovan viðger umsóknina og tekur avgerð í málinum.

## 3. Avleiðingar av vantandi lestrarvirkni

### 3.1. Ongantíð byrjað lestur

Eru tekin um, at ein innskrivað/ur lesandi ongantíð er byrjað/ur við lestrinum við lestrarbyrjan, so setur Setrið seg í samband við viðkomandi við 14 daga svarfreist fyri at fáa staðfest, um hon ella hann framhaldandi skal vera innskrivað/ur sum lesandi, ella skal útskrivast frá lestri á Setrinum.

Vísir viðkomandi á serligar orsakir til, at hon/hann ikki byrjaði lestur við lestrarbyrjan og hevur ynski um framhaldandi at vera innskrivað/ur sum lesandi á Setrinum, so kann Lestrarskrivstovan játta framhaldandi innskriving undir teirri treyt, at viðkomandi veruliga fer undir lestur innan nærri ásetta freist.

Váttar viðkomandi, at hon/hann skal útskrivast sum lesandi, fær hon/hann beinanvegin skrivlig boð um, at hon/hann eftir egnum ynski er útskrivað/ur frá lestri á Setrinum við gildi dagin eftir, at fráboðanin er komin fram til tann lesandi.

Svarar viðkomandi ikki áheitanini frá Setrinum innan ásettu 14 daga freistina, sendir Lestrarskrivstovan viðkomandi hoyringarskriv um útskriving. Letur viðkomandi ikki við seg koma innan 14 dagar, fær hon/hann skrivlig boð um, at hon/hann er útskrivað/ur frá lestri á Setrinum frá 1. í fyrstkomandi mánaðinum.

Avgerð um útskriving skal hava nøktandi grundgeving og kæruvegleiðing.

## 3.2. Ikki nóg lestrarvirkin fyrstu lestrarhálvu av bachelorútbúgving

Heldur undirvísari, at ein lesandi møtir ov illa upp til undirvísing og/ella ikki er nóg virkin í undirvísingini undir fyrstu lestrarhálvu av bachelorútbúgving, heitir undirvísarin á tann lesandi at bøta um hesi viðurskifti. Um áheitanin til tann lesandi ikki ger mun, biður undirvísarin lestrarvegleiðingina bjóða tí lesandi til eina samrøðu um lestrarstøðuna, og hvussu bøtast kann um lestrarvirkni.

Tann lesandi ella lestrarvegleiðarin gevur undirvísaranum afturboðan eftir samrøðuna. Innihaldið í afturboðanini, og hvussu afturboðanin verður givin, verður avtalað millum tann lesandi og lestrarvegleiðaran. Um tann lesandi ikki møtir til samrøðuna, boðar lestrarvegleiðarin undirvísaranum frá hesum.

Møguligar strangari avleiðingar av vantandi uppmøting og vantandi virknari luttøku undir fyrstu lestrarhálvu av bachelorútbúgving, ásettar í námsskipanum og/ella skeiðslýsingum, ganga fram um ásetingarnar í hesi reglugerð.

## 3.3. Avrikar ikki ECTS minstukrøvini

Lesandi, ið ikki lýkur árligu ECTS minstukrøvini, skal eftir áheitan frá Lestrarskrivstovuni søkja um frávik frá kravinum um lestrarvirkni, um viðkomandi skal kunna halda fram við lestrinum.

Í umsóknini skal verða greitt frá, og, um møguligt, eisini skjalprógvað, hví lestrarvirkniskravið ikki er hildið. Tann lesandi hevur eisini ábyrgd av, at eitt uppskot um tillagaða lestrargongd, sum fær lestrarvirkni aftur á beint, er lagt við umsóknini; tann lesandi kann í hesum sambandi leita sær neyðuga vegleiðing og hjálp frá útbúgvingarleiðara og/ella lestrarvegleiðara.

Umsóknin skal latast Lestrarskrivstovuni, sum viðger málið og tekur avgerð um lestrarvirkni og góðkenning av tillagaðari lestrargongd.

Verður avgjørt, at viðkomandi – hóast uppskot um tillagaða lestrargongd fyriliggur – ikki er lestrarvirkin, og harvið ikki kann halda fram við lestrinum á Setrinum, so skal viðkomandi partshoyrast, áðrenn avgerð verður tikin um útskriving.

Avgerð um útskriving skal hava nøktandi grundgeving og kæruvegleiðing.

## 3.4. Tillagað lestrargongd verður ikki fylgd

Verður ein góðkend tillagað lestrargongd ikki fylgd, fær tann lesandi eftir áheitan frá Lestrarskrivstovuni enn ein møguleika, innan 14 dagar, at søkja um frávik frá lestrarvirkniskravinum og leggja eina nýggja lestrargongd eftir somu mannagongd og kravi um skjalprógvan sum við fyrru umsóknina um frávik.

Letur tann lesandi ikki inn umsókn innan ásettu freistina, ella verður ein nýggj og góðkend tillagað lestrargongd ikki fylgd innan nærri ásetta freist, so fær viðkomandi við 14 daga freist hoyringarskriv um útskriving frá útbúgvingini.

Avgerð um útskriving skal hava nøktandi grundgeving og kæruvegleiðing.

## 4. Kærur

Avgerðir viðvíkjandi lestrarvirkni kunnu kærast til landsstýrismannin innan 4 vikur, eftir at avgerðin er fráboðað.

Kæra verður skrivliga send til Lestrarskrivstovuna á Fróðskaparsetri Føroya, ið sendir kæruna víðari til landsstýrismannin saman við sínum ummæli av málinum.

Áðrenn málið verður sent landsstýrismanninum, skal gevast kæraranum høvi til, innan 7 dagar, at gera viðmerkingar til ummælið, og møguligar viðmerkingar kærarans skulu eisini sendast landsstýrismanninum.

***Henda reglugerð er viðgjørd og samtykt av setursleiðsluni 27. juni 2024.***